# Nú verður tryggari at ferðast hjá sumbingum

**Ein av fyrstu døgunum hendir tað, sum sumbingar í nógv ár hava glett seg til: At bergholið millum Lopra og Sumba alment verður latið upp fyri ferðslu, soleiðis at ikki verður neyðugt at koyra upp um Hestin á vetrartíð.**

SNORRI BREND

Enn er dagurin fyri almennu upplatingini ikki ásettur. Men á Landsverkfrøðinginum verður upplýst, at hetta verður ein av allar fyrstu døgunum – í øllum førum áðrenn jól.

Arbeiðið upp á bergholið byrjaði í mars mánaði 1987 og sløk fýra ár eftir hetta varð komið so langt, at menn kundu skjóta seg ígjøgnum fjallið. Síðani tá hevur verið arbeitt inni í bergholinum og við at gera vegføringina til reiðar bæði í Lopra og Sumba.

At hetta nú gerst veruleiki verður eisini sæð sum ein fyrimunur fyri Sumbiar bygd, sum í mangar mátar liggur avsíðis og rættiliga avskorin í mangar mátar.

– Men at hava góð samferðsluviðurskifti er ein fortreyt fyri trivnaði í einihvørji bygd. Vón okkara er nú, at fólk aftur fer at seta búgv her, hóast tey hava arbeiði aðrastaðni, hevur bygdarráðsformaðurin Jacob Vestergaard áður sagt um týdningin av bergholinum.

Hetta bergholið til Sumbiar er tað 15. í Føroyum, og samstundis tað longsta við sínum 3.180 metrum. Hæddin í bergholinum er 4,60 metrar og vegbreiddin 6 metrar.

## Í tøkum tíma

Fyri Sumbiar kommunu, ið fevnir um bygdirnar Sumba, Lopra, Akrar og Víkarbyrgi, er tað helst so, at bergholið kemur í tøkum tíma.

Hagtølini fyri kommununa vísa greitt, at stór afturgongd hevur verið í íbúgvaratalinum, og er lækkað við nærum einum fimtingi tey seinnu árini.

Longu fyri fýra árum síðani fór fólkatalið í kommununi niður um tey 500, og við árslok í 1994 var talið komið niður á 456. Síðani tá hevur gongdin hildið fram, og við ársskiftið vóru 432 borgarar í Sumbiar kommunu.

Fyri Sumbiar bygd hevur íbúgvaratalið eisini verið í minking. »Árbókin fyri Føroyar« vísir í yvirliti sínum á, at við árslok í 1994 vóru 304 fólk búsitandi har, og við árslok í 1996 289.

Tí verður uttan iva sæð við bjartskygni fram móti degnum, tá bergholið nú verður alment latið upp. Fyri Sumbiar kommunu er tað helst so, at tað bert kann ganga ein veg – frameftir.

Vónir verða tí settar til at bergholið fer at leggja lunnar undir størri vinnuligt virksemi í kommununi, soleiðis at skeiva gongdin við fólkatalinunm fer at venda.

## Tríggir eyðsýndir fyrimunir

Fyri fólkið í Sumba verður talan um tríggjar eyðsýndar fyrimunir, sum verða skaptir tann dagin koyrandi verður til Sumbiar gjøgnum bergholið.

Í fyrstu atløgu fer hetta at gera tað munandi lættari og høgligari at koma aftur og fram hjá teimum sumbingum, sum hava arbeiðspláss sítt aðrastaðni á Suðuroynni, t.d. í Lopra, Vági ella á Tvøroyri.

Í aðru atløgu verður tað munandi tryggari farleið millum heim og skúla hjá skúlabørnunum, sum ganga í framhaldsdeildini við Vágs skúla, nú ikki er neyðugt at fara upp í 400 metra hædd um Hestin á vetrartíð.

Og í triðja lagi verða nú eisini skaptir munandi betri møguleikar fyri at fara undir vinnuligt virksemi í Sumba. Somuleiðis verður flutningurin lættari og høgligari hjá teimum útróðrarmonnum, sum liva av hesum, men sum ikki kunnu hava bátar sínar liggjandi trygt alt árið í heimbygdini.

## Koyrilíkindini

Tað skal ikki vera rættiliga kalt í veðrinum, fyrr enn veðurtænastan hjá Landsverkfrøðinginum nevnir Sumbiarvegin, tá talan er um koyrilíkindini kring landið.

Hetta vegastrekkið er í mangar mátar eitt ringt pláss til veður, og liggur vegurin um Hestin á eini 400 metra hædd, har hann er hægstur. Av hesi orsøk legst rættiliga skjótt kavi á økinum eins og har er rættiliga vindhart.

Hóast koyrandi nú verður gjøgnum berghol millum Lopra og Sumba, so verður framvegis neyðugt hjá monnunum hjá Landsverkfrøðinginum at rudda kavan burtur á vegastrekkinum til Sumbiar, í øllum førum á teininum millum Lopra og Víkarbyrgi.



**Við bergholinum til Sumbiar verða nú skaptir møguleikar fyri at fara undir vinnuligt virksemi. Somuleiðis verður flutningurin lættari og høgligari hjá teimum útróðrarmonnum, sum liva av hesum, men sum ikki kunnu hava bátar sínar liggjandi trygt alt árið í heimbygdini**

BÓKASØLAN
Um tú vilt vita meira
Erling Poulsen signerar í dag




Í dag millum klokkan 4 og 5 signerar Erling Poulsen nýggju bók sína Tjaldrið í Bókasøluni.
*Erling Poulsen*
**Tjaldrið**
Kr. 180,-
Bókasølan
SMS • Tel. 19575

# Saga fíggjar oljuverkætlan fyri hálva millón

**Fróðskaparsetur Føroya skal standa fyri verkætlanini, ið skal avdúka samfelagsligar og búskaparligar avleiðingar, sum oljuvinnan kann hava fyri fiskivinnuna her á landi.**

DIA MIDJORD

Hvørjar møguligar avleiðingar kemur oljuvinnan at hava fyri høvuðsvinnuna her á landi. Hesin spurningur skal svarast í eini granskingarverkætlan, har føroyingar valda og norðmenn gjalda.

Norska oljufelagið Saga Petroleum hevur játtað at rinda hálva millión krónur, so henda verkætlan kann fáast frá hondini. Tað er Fróðskaparsetur Føroya, ið stendur fyri arbeiðnum og tekur sær av øllum tí umsitingarliga, meðan fiskivinnukandidaturin Jens Helgi Toftum stendur til svars fyri fakliga partinum.

Endamálið við verkætlanini er at lýsa, hvørjar búskaparligar avleiðingar standast av, tá oljuvinnan leggur hald á fiskileiðir. Ein spurningur, sum eisini verður umrøddur, er kappingin millum oljuvinnu og fiskivinnu um arbeiðsmegið.

Ein stýrisbólkur mannaður við fimm umboðum er settur at fylgja við arbeiðnum. Anthon Kjelaas frá Saga Petroleum er formaður. Hinir limirnir eru Hjalti í Jákupsstovu, Fiskirannsóknarstovan, Óli Jacobsen, Fiskimannafelagið, Jákup Sólstein, Reiðarafelagið og Karin Toftegaard frá oljudeildini í vinnumálastýrinum.

Norskt ráðgevingarfelag, ið hevur gjørt fleiri slíkar kanningar, skal veita fakliga vegleiðing.





# Sambandsvaralimir í býráðið



Súsanna Dam

Í løtuni hava tveir varabýráðslimir tikið sæti í Tórshavnar býráð, og skulu teir umboða Sambandsflokkin í býráðnum í minsta lagið henda mánaðin út.

Meðan Lisbeth L. Petersen og Kaj Leo Johannesen hava farloyvi úr býráðnum, umboða Súsanna Dam og Bent Jákup Hansen Sambandsflokkin.

Súsanna Dam umboðar Lisbeth nú, og Bent Jákup umboðar Kaj Leo. Frammanundan hevur Súsanna Dam umboðað Kaj Leo í eina tíð, meðan hann hevur verið í farloyvi.

B.



Bent Jákup Hansen

